## Lupu á tangaskip

Hóast herskip úr fleiri londum eru á varðhaldi fram við eysturafrikonsku strondini, gera teir somalisku sjórænararnir framvegis um seg. Samstundis fara teir longri og longri til havs. Tað sást millum annað í gjár, tá sjórænarar lupu á eitt tangaskip, hóast tað var meiri enn 900 fjórðingar úr somalisku strondini. Reuters skrivar, at sjórænararnir lupu á við maskinbyrsum og granatvarparum, men at tað eydnaðist tangaskipinum at sleppa til rýmingar. 190 fólk eru í løtuni gíslar hjá somaliskum sjórænarum. Teirra millum eru eini bretsk hjún, sum vórðu rænd í síðsta mánað.



## Thaksin í Kambodja

Fyrrverandi teilendski forsætisráðharrin Thaksin Shinawatra kunngjørdi í morgun, at hann er komin til Kambodja, og at hann hevur valt at búseta seg har. Eygleiðarar siga, at teilendska stjórnin er neyvan fegin um ta avgerðina. Alment verður sagt, at Thaksin skal arbeiða sum fíggjarligur ráðgevi hjá kambodisku stjórnini, men eygleiðarar siga, at hansara veruligu ørindi eru at sleppa nærri sínum mongu stuðlum í Teilandi. Thaksin Shinawatra bleiv frákoyrdur við eitt hernaðarkvett í 2006, og hann bleiv dømdur tvey ára fongsul fyri fíggjarligt óskil.



*Øll andstøðan og ein flokkur í samgongu vil nú geva bankunum almenna kapping. Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin halda ikki, at tað almenna skal eiga bankar*

# Tingið vil hava almennan realkreditt

**Allir flokkar halda bankarentuna vera ov høga, og hetta hava flokkarnir á tingi tríggjar ymiskar loysnir til. Fýra flokkar ynskja almenn føroysk realkredittlán, ein vil senda kappingarráðið eftir bankunum og ein vil tosa við bankarnar**

RENTA

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Sjálvsstýrisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldi vilja hava ein føroyskan realkredittstovn, og teir vilja allir hava æruna, um hann verður settur á stovn. Miðflokkurin hevur ikki veruliga hugsað um spurningin, men hellir sama veg.

Fólkaflokkurin vil beita kappingarráðið á bankarnar.

Og Sambandsflokkurin vil tosa við bankarnar.

Hetta er støðan á politiska leikpallinum, nú allir flokkar halda uppá, at rentan í Føroyum er ov høg og tí tálmar búskapinum.

### Tosa við teir

Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, metir, at loysnin upp á rentuna er at tosa við bankarnar.

– Eg haldi, at vit skulu hava ein betri dialog við bankarnar, so vit finna fram til, hví vit hava fatanina, at rentan er ov høg, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann leggur afturat, at tað eisini kundi borið til at senda kappingarráðið eftir bankunum, um tað ikki kemur nakað burturúr at tosa við teir.

Hinir flokkarnir halda sum heild, at skuldi nakar dialogur verið gjørdur við bankarnar, so skuldi hann langt síðan verið gjørdur, og at teir hava roynt.

– Vit hava roynt at tosa við bankarnar. At heita á teir at halda aftur við rentuni. Tað hava næstan allir floksformenninir gjørt, men tann boðskapurin er ikki komin inn, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Kappingarráðið á bankarnar

Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum, heldur eisini rentuna vera ov høga, og hann heldur sum Sambandsflokkurin, at tað eigur at bera til at senda kappingarráðið eftir bankunum.

– Vit hava fyrr sæð við bensinstøðunum, at kappingarráðið fór inn og syrgdi fyri, at vinningurin bleiv minni. Eg dugi ikki at sígga, hví kappingarráðið ikki skuldi farið inn at kanna viðurskiftini har, sigur Jørgen Niclasen.

Men í tíðindunum hjá Kringvarpinum í gjárkvøldið varð staðfest, at kappingarráðið ætlaði at kanna bankarnar, men hevði ikki neyðuga fíggjarliga orku í ár, og fer tí í gongd í komandi ári.

Viðvíkjandi kappingarráðnum heldur Miðflokkurin, at ráðið langt síðan